# Starvsfólk til Barnaverndar-tænastuna

**Fyri: Sørvágs,- Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur**

Við hesum verður søkt eftir starvsfólki til Barnaverndartænastuna fyri Sørvágs-, Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur til setan skjótast gjørligt.

Talan er um hálvtíðar farloyvisstarv fram til november/desember 2007.

Barnaverndartænastan heldur til á kommunuskrivstovuni í Sandavági og nakað av ferðing má roknast í starvinum.

**Arbeiðsøki:**
Tú kemur í tøttum samstarvi við leiðaran at taka tær av málsviðgerð av barnaverndarmálum og umsiting av børnum við serligum tørvi sbrt. § 5 í dagstovnalógini.

Arbeiði er fjølbroytt og umfatar, umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði, m.a. heimavitjanir, at ráðgeva børnum og/ella familjum teirra, at samstarva við og seta stuðlar í starv.

Arbeiðið umfatar somuleiðis samskifti og tvørfakligt samstarv við skúlar, dagstovnar/dagrøktir, læknar, heilsurøktarfrøðingar, løgreglu, almennar stovnar o.o.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur hóskandi miðallanga útbúgving, t.d. sosialráðgevi.
- At tú hevur arbeiðsroyndir innan málsviðgerð í almennari umsiting og/ella hevur royndir frá barnaverndararbeiði.
- At tú ert fleksibul og hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert ábyrgdarfull/ur, miðvís/ur og sjálvstøðug/ur í arbeiðnum.
- At tú ert nærverandi og hevur umsorgan fyri barnsins tørvi.
- At tú hevur góðan telduførleika
- At tú hevur góðan kunnleika í føroyskum máli.

**Løn:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

**Umsókn:**
Hevur starvið tín áhuga, send so skrivliga umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum til

**Barnaverndartænastuna**
**Postrúm 19**
**360 Sandavágur**

Umsóknin skal verða Barnaverndartænastuni í hendi í seinasta lagi mikudagin 27. september 2006 kl. 12.00.

Nærri upplýsningar um starvið fáast við at venda sær til Súsannu Nordendal, leiðara á telefon 333 960 ella 213 960.

Barnaverndartænastan tilskilar sær rættin til at søkja av nýggjum um ikki nóg nógvar umsóknir eru til starvið.

**Barnaverndartænastan**

---

Barnagarðurin á Konmansmýru

# Pedagogur/ Hjálparfólk

**Vit søkja eftir 1 Pedagogi/hjálparfólki**
Søkt verður eftir einum stuðulsfólki 30 tímar um vikuna, at byrja skjótast gjørligt og fram til 1. juli 2007.

Tað eru 2 børn sum deilast um hesar 30 tímarnar. Á stovuni eru 16 børn 6-7 ár.

**Um arbeiði:**
Bæði børnini hava stuðulstørv í tí dagliga, bæði við rørslum og talu. Tað eina barnið skal eisini hava sondumat. Børnini ganga til Ergo og fysioterapeut og verður hettar eisini ein partur av arbeiðinum.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**
- Trivnaðin
- Opinleika
- Samarbeiði

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsandi og ígongdsetandi
- Heldur tað vera spennandi og mennandi.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran Elsebet Bolstad ella varaleiðaran Eyðvør Jensen, tlf. 317878.

Umsókn við avirit av prógvi og møguligum viðmæli skal vera okkum í hendi seinast 29. september 2006.

**Barnagarðurin á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO-100 Tórshavn

---

# Fólk søkist

Fólk søkist at standa í klædnahandli. Arbeiðstíðin verður nakrar tímar um vikuna.

Løn eftir avtalu.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur arbeitt í handli áður.

Skrivlig umsókn verður at senda áðrenn 1. okt. 2006.

**Sp/f John Poulsen**
Vatnsoyrar
Tlf 33 20 34 • Fax 33 35 34

---

## Endurlýsing

# Kunngerð

## Um broyting av Býarplaninum fyri Runavíkar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Býráðið á fundi **31/08-06** hevur samtykt at gera broytingar í býarplaninum í Runavík og á Skála.

**Runavík**
Broytingin í Runavík umfatar nýtt **B-øki** á matr. nr. 51 sunnan fyri matr. nr. 54 og 55 og nýtt **C4-øki** á matr. nr. 51 sunnan fyri matr. nr. 44 í Runavík.

**Skála**
Broytingin á Skála umfatar nýtt **B-øki** á C4-øki og E1-øki vestan fyri Sambýli, og umfatar broytingin hesar matriklar:
34a, 42a, 62a, 75a, 76a, 77a, 80, 82, 85a, 86, 87a, 91a, 92a, 94, 116a, 117a, 120a, 121a, 123a, 125a, 126a, 128a, 132a, 133a, 135a, 141a, 144, 148, 300a, 315a, 335, 336, 337a, 341, 342, 343, 399, 401, 402, 403, 404, 425, 544a, 545 og 621.

Broytingarnar eru til skjals á býráðsskrivstovuni í upplatingartíðini frá 15. september til og við 6. oktober 2006.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 15. december 2006.

Runavíkar Kommuna.

Saltangará, tann 15/09-2006
**Runavíkar býráð**

**Lýsingin df. 8. september 2006 verður hervið afturtikin.**

---

# Sølufólk til Hvítvøru-deildina á Hjalla

Vit sóknast eftir einum sølufólki til Vøruhúsið á Hjalla, at byrja skjótast tilber.

Talan er um tað nýggju Hvítvørudeildina. Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv, við nógvum dagligum avbjóðingum.

Arbeiðið umfatar m.a. avgreiðslu av kundum, daglig røkt av handlinum og innkeyp.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, tænastusinnaður, ágrýtin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir ella útbúgving innan handilsvinnu, men hetta er ikki ein treyt.

Meira fæst at vita við at venda sær til Birgir, tlf. 342500.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi seinast hósdagin tann 21. september 2006 og skal sendast til:

LITAVAL P/F

Box 1019 · 110 Tórshavn
att: Birgir
e-mail: bav@litaval.fo